vikingablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
Figgjarleiðari: Sveinur Tróndarson

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen

Blaðfólk: Dagny Joensen, Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Niclas Johannesen, Dagfinn Olsen, John Johannessen

ítróttarskrivari: Emil L. Jacobsen

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting og prent: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo

Upplýsingin er tryggasta verjan

Oddagrein

Mánadagurin seinasti var altjóða kvinnudagur, og í hesum sambandi hevði Útvarp Føroya eitt panel í morgunsendingini, har fýra kvinnur saman við vertinum tosaðu um fosturtøku.

Kvinnurnar tyktust sera samdar um, at ein so álvarslig avgerð, sum at taka eitt fostur í móðurlívi, eigur at verða gjølla umhugsað, og at tað altíð er kvinnan sjálv - ráðførd av lækna sínum, sum veit best, heldur enn serlæknar av ymsum slag.

Spurningurin um fosturtøku stingur seg javnan upp - eisini í almenna kjakinum her hjá okkum.

Um dagarnar frættist, at ES arbeiðir við at stinga í kortið fríari reglur á hesum øki, hóast tað ikki er so lætt hjá teimum at samansjóða liberalu sjónarmiðini í Norðanlondum við konservativu sjónarmiðini - eitt nú úr Írlandi.

Her heima hjá okkum hevur evnið altíð verið eitt heitt mál, tí vit hava ongantíð viljað sett í verk fría fosturtøku, eins og í hinum Norðanlondunum.

Sum tað eisini kom fram í panelinum í morgunsendingini hendan morgunin, so er tað ikki rætt, at fosturtøka skal nýtast sum fyribyrging. Heldur eiga og skulu vit upplýsa okkara ungdóm, dreingir sum gentur um, hvussu týdningarmikið tað er, at tey bera seg rætt at í kynslívinum.

Nú er so uppskot komið fram á tingborð, har fýra tingmenn mæla til at gera reglurnar viðvíkjandi fosturtøku strangari - eitt nú við at serlæknar fyrst skulu siga sína støðu.

Hetta málið er ikki gjørt til eitt flokspolitiskt mál, og eru tað tríggir tingmenn, sum eru kendir fyri at vera rættuliga víðgongdir, sum saman við yngsta tingmanninum nakrantíð, hava lagt navn til nevnda mál.

Tað kann undra mangan, at ein ungur politikari, sum Jákup Sverri Kass leggur navn til slíkt, tí eftir okkara tykki er hetta eitt skot við síðunaav.

Okkara ráð til politikararnar eru, at teir ikki gleivbeintir loypa á fundamentalistiska vognin, sum tosar um devul og dráps-mannalyndi, men heldur viðgera málið í tí álvara, tað hevur uppiborið.

Upplýsing, upplýsing og aftur upplýsing er helst tryggasta verjan móti fosturtøku. Men tá tað er neyðugt, er tað av størsta týdningi, at føsturtøka verður framd á tryggasta hátt.

Sosialurin

Lesarabrøv

Nær vaknar Tryggingarfelagið Føroyar

Nú Tryggingarfelagið Føroyar (TF) hevur fingið kapping í Føroyum, skuldi ein trú, at teir (TF) vaknaðu úr sínum monopolsvøvni - men gakk, tað sær út til, at TF alsamt skal hava eitt spark í afturpartin fyri at vakna.

Biltryggingar
TF er komin út við einari nýggjari biltrygging, sum kundarnir einki vita um, tí kunning frá TF til kundarnir er næstan eitt ókent fyribrigdi.

Fjølmiðlarnir hava skriva okkurt um hesa bilatrygging, men kundarnir hjá TF standa á berum, sum ikki einaferð. Tað er háost alt kundarnir sum gjalda og hava **krav** uppá meira kunning.

Forstjórin á TF kemur í fjølmiðlarnar og sigur, at TF setur prísirnar niður, um kappingarneytin er bíligari.

Hevur TF bert ráð at seta tryggingargjaldið niður, tá ið kappingarneytin er bíligari?

Hevur TF snýtt kundarnar og tikið ov høgt tryggingargjald?

Hví bíðar TF altíð eftir kappingarneytanum, hví ikki koma við einum produkti sum kappingarneytin ikki hevur ráð til?

Nær vaknar leiðslan á TF?

Sethús-Neyst-pakkatrygging
Hvat fyri útrokning brúkar TF til pakkatryggingina, tað undrar nógvar kundar, hví størri hús eru bíligari enn minni hús í tryggingargjaldi.

Eg havi júst fingið at vita frá einum kenningi, at um ein hevur neyst undir 75 m² í somu bygd, so kann neystið koma undir pakkatryggingina t.v.s. at **tryggingargjaldið blívir bíligari fyri neystið.**

Hví kunnar TF ikki kundarnar um hesi viðurskifti?

Er politikkurin hjá TF tann, at so leingi kundarnir einki vita, so lata vit bert kundarnar gjalda?

Nær fáa kundarnir hjá TF nøktandi kunning frá TF.

Sjóvartryggingin
Allir bátaeigarir vita hvussu kostnaðarmikil henda trygging er.

Ætlar TF eisini at sova omaná hesari trygging, til kappingarneytin vekir TF og bjóðar bíligari trygging?

Niðurstøða
Tryggingarfelagið Føroyar kunnar ikki sínar kundar nóg væl, so at hesir sleppa undan at gjalda óneyðuga høg tryggingargjøld, **men tað er kanska við vilja?**

Stórur vandi er fyri, at kundarnir hjá TF føla seg snýttar.

Tryggingarfelagið Føroyar **er ikki vakna** úr sínum monopolsvøvni.

Finnleif Guttesen
Tvøroyri

Norts Atlantic Provider gevst fyribils

Nevndin í P/f Norts Atlantic Provider boðar frá, at alt virksemi felagsins er lagt stilt fyribils, og at starvsfólkið er sagt úr starvi. Víst verður á, at tað var við góðum treysti, at fýra føroyskeitt norskt- og eitt skotskt felag í heyst stovnsettu felagið P/f North Atlantic Provider. Felagið skuldi virka við at útvega arbeiði innan eina komandi oljuvinnu. Suni á Dalbø, ið hevur virkað sum ráðgevi hjá Suður-Vestur Samtakinum, stóð á odda í stovnsetanini, og gjørdist stjóri.

Nú er so avgerð tikin um at niðurleggja alt virksemið felagsins, hóast felagið á ongan hátt er farið á húsagang. Nevndin kom uppí fyri einum mánað síðani, tí ov nógvir pengar vórðu brúktir í mun til inntøkurnar.

Virksemi felagsins er lagt stilt, men kann fara at virka aftur, tá tiðin er búgvin til tess.

Aðalfundur og ræstkjøtaveitsla

Føroyingafelagið á Lolland-Falster hevur ræstkjøtaveitslu í Systofte Forsamlingshus, leygarkvøldið 17. mars kl. 18.30.

Aðalfundurin byrjar kl. 17.

Tilmelding hjá: Ásu 54706426 ella Solveig 54148004.

Nýggjur formaður í Samfylking

Birgir Enghamar er nýggju formaður í Samfylking

Aksturvinnufelagið Samfylking hevur tann 1.3.99 havt aðalfund, har nýggj nevnd bleiv vald.

Á nevndarfundi 4.3.99 skipaði nevndin seg soleiðis:

Formaður: Birgir Enghamar (nývaldur). Næstformaður: Lars Egemose (aftur-valdur). Kassameistari: Dánjal J. Norðfoss, (nývaldur). Skrivari: Arnfinn Kithler (nývaldur). Nevndarlimur: Danny Danielsen (nývaldur).

†

Kunngjørt verður at

SVAVA KRISTIN SIGURDARDÓTTIR
Sandgerði, Ísland

andaðist leygardagin 6. mars, 80 ára gomul.

Jarðarferðin verður frá Hvalsnes kirkju fríggjadagin 12. mars kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi

Eskild Jóhannesson